Vágamenn komu upp á talvuna

Fótbóltur: Spælarar, hugburður og avrik hjá klaksvíkingum var langt frá tí, sum teir sýndu ímóti ungverjum í seinna Europa Cup dystinum

1. deild menn:
FSV-KÍ 1-1 (0-1)

Endiliga eydnaðist tað hjá samansetta vágaliðnum. Í tíggjunda umfarinum fingu teir fyrsta stigið á kontoina, og teir hava ikki mist mótið um, at teir eisini komandi ár fara at hava lið í bestu deildini:

– Enn eru nógv stig eftir at spæla um, og vit hava somu møguleikar at fáa stig, sum hini liðini hava. Vit hava meiri fólk nú, enn vit hava havt, og hugurin at venja er eisini betri, so vit hava ikki mist mótið, sigur Piotr Krakowski. Hann ætlaði ikki at spæla við í ár, men neyðin gjørdi, at hann noyddist at spæla fyri summarfrítíðina. Ímóti KÍ var hann bara á vøllinum tríggjar teir síðstu minuttirnar.

KÍ fleiri stórar møguleikar

Klaksvíkingar komu á odda, tá 37 minuttir vóru farnir. Arnold Joensen skoraði málið. Uppspælið var gott í vinstru síðu, og Sørin Petersen hevði kunnað roynt seg eftir innleggið frá Heðin á Lakjuni, men hann valdi at trilla uppá tvørs til Arnold, sum sendi í netið umvegis ein verjuspælara og stólpan.

KÍ hevði lotið undan 1. hálvleik, og tá høvdu teir fleiri upplagdar málmøguleikar. Allan Joensen, sum var komin úr Danmark í vikuni, var leysur við málverjanum, men tað endaði við hornasparki. Olgar Danielsen sendi í síðunetið, tá hann var leysur, Álvur Samuelsen hálvbjargaði roynd frá Arnoldi Joensen, og Sørin Petersen sendi returin í liggjandi málverjan, og stutt undan steðginum stútaði Sørin Petersen úr stuttari fjarstøðu á málverjan, eftir at Rógvi Jacobsen var farin ígjøgnum í síðuni og hevði lagt innfyri.

Vágamenn tóku yvir

Seinna umfarið hevði FS Vágar lotið undan, og tá gekk nógv av spælinum fyri seg á hálvuni hjá klaksvíkingum.

Í 1. hálvleiki hevði FS Vágar fyrsta stóra møguleikan, tá Bjarni Prior, sum var sera væl upplagdur, tók bóltin av KÍ miðverjuni, men einki spurdist burturúr, og tíðliga í 2. hálvleiki høvdu teir aftur ein stóran møguleika, tá rangstøðufellan hjá KÍ kiksaði. Heðin á Lakjuni bjargaði á strikuni.

Ofta sendu vágamenn høgt undan vindinum, og tað bar trýst og nógvar nærdystir við sær framm anfyri KÍ málinum, og onkrar vandamiklar frísparksstøður stóðust av hesum.

Men tað tóktist ikki at vera serliga vandamikið, tá teir ellivu minuttir inn í 2. hálvleik fingu fríspark stutt frá baklinjuni. Marek, sum aftur hesa ferð var stúttur á miðvøllinum, royndi beinleiðis ímóti málinum, sýnið hjá málverjanum var vánaligt, tí har var nógv fólk, og bólturin fór ímillum beinini á tveimum klaksvíkingum, áðrenn hann fór um strikuna.

KÍ hevði onkrar kontramøguleikar, og vágamenn vóru tætt við at skora sigursmálið.

Jóannes Jakobsen var avgjørt ikki nøgdur við avrikið hjá sínum monnum. Tað var ljósár burtur frá tí, sum teir sýndu á Svangaskarði ímóti ungverska liðnum.

Klaksvíkingar hava ongan møguleika at enda ímillum fremstu liðini, men sjálvandi fara teir at spæla fyri at røkka so langt upp í miðjuni, sum tað ber til. Í annaðkvøld fáa teir vitjan av VB, og tá eru teir tríggir, sum vóru leikbannaðir í Miðvági, tøkir aftur.

(jh)

HB vann á EB/-Streymi

2. deild menn:
HB-EB/Str. 2-0 (0-0)

2. lið hjá HB stóð seg betur enn 1. lið gjørdi tað fyrradagin.

HB hevði vitjan av EB/Streymi, sum liggur í botninum í 2. deild, og teir vunnu 2-0.

Andrew av Fløtum, sum hevur verið nakað við á 1. liði í ár, gjørdi bæði málini hjá HB.

Dysturin var mesta av tíðini einvegis ferðsla móti málinum hjá EB/Streymi, og HB-málverjin, Bárður Johannesen, var ofta at finna væl frammi á vøllinum.

HB fekk ikki hol á fyrr enn í seinna hálvleiki, og málini kundu verið fleiri enn tey tvey. EB/Streymur kundi eisini havt skorað, tá Bárður onkuntíð var um at gerast ov skjøtisleysur.

EB/Streymur liggur eitt fet frammanfyri B68, sum er aftast í deildini, men í mun til í fjør, er støðan í Sundalagnum ikki góð.

Nógvir av teimum, sum vóru stuðulsspælarar í fjør, eru ikki við, og uppmøtingin til venjing kundi havt verið betur.

Hetta hevur ávirkað liðið, og nú ræður um hjá teimum at halda seg í 2. deild, meðan teir í fjør vóru við í toppinum.

HB liggur í miðjuni í deildini, eftir at teir í fleiri ár hava verið við í oddinum.

(ek)

Tríggir spælarar renna um kapp við tíðina

Fótbóltur: Tað er ivasamt, um Uni Arge, Jens Kristian Hansen og Todi Jónsson vera førir fyri at fara við landsliðnum niður til Kekkia

Landsliðsvenjarin fer at lata frætta frá sær í dag. Hann skal taka átjan spælarar út til stóru avbjóðingina niðri í Kekkia mikudagin í komandi viku.

Landsliðið fer úr Vágum við Atlantic Airways sunnukvøldið klokkan 18.30, teir millumlenda í Keypmannahavn, har útisetarnir koma umborð, og ætlanin er, at teir skulu lenda í Prag klokkan 23.45.

Flogfarið hjá Atlantsflog skal niður aftur eftir landsliðnum, tá dysturin er liðugur mikukvøldið. Tá millumlenda teir í Aarhus, har útisetarnir verða settir av, og klokkan 2.45 hósmorgunin rokna teir við at vera aftur í Vágum.

Tunnligt í miðverjuni

Allan Simonsen fer at velja umleið teir somu spælararnar hesa ferð, sum vóru við til at vinna í Estlandi. Tey bæði málverjuplássini fara til Jens Martin Knudsen og Jákup Mikkelsen, sum saman við liðfeløgunum fríggjakvøldið á heimavølli tapti 3-1 ímóti AGF. Ole Mørch, venjarin hjá Herfølge, var alt annað enn nøgdur við avrikið hjá sínum monnum, sum eftir hansara tykki blakaðu alt tað burtur aftur, sum teir høvdu víst, tá teir vunnu á útivølli ímóti Aab.

Verri er vorðið, tá tað ræður um miðverjuna. Í Estlandi spældu Bartal Eliasen og Pól Thorsteinsson frammanfyri Óla Johannesen, og teir vera eisini við í ferðalagnum í Kekkia, men spurningurin er, um nakar annar møguleiki er. Jan Dam er leikbannaður, Andreas F. Hansen er ikki serliga væl fyri, og Jens Kristian Hansen er ikki heilt klárur enn. Hann venur við B36, og tað gongur rætta vegin, men hann var ikki á liðnum á Toftum, og um hann skal vera klárur til landsdystin, so skal hann helst spæla í annaðkvøld og í hvussu so er leygardagin, tá FS Vágar kemur í Gundadal.

Pól Thorsteinsson og Bartal Eliasen stóðu seg væl í Íslandi og í Estlandi, men tað er kanska ikki so heppið við tveimum so óroyndum monnum, tá mótstøðuliðið eitur Kekkia á útivølli. Og undir øllum umstøðum skal ein eykamaður finnast til teir báðar, um Jens Kristian Hansen ikki kemur við. Janus Rasmussen hevur verið ógvuliga stúttur í GÍ Vrjuni í ár, men hann hevur áður boðað frá, at hann er ikki tøkur hjá landsliðsvenjarunum, og sunnudagin kom hann ikki aftur á vøllin eftir hvíldina, tí hann var skaddur. Um landsliðsvenjarin hevur ætlanir um at finna eitt nýtt evni til miðverjuna, so hevði ikki verið av leið, at hann setti seg í samband við fyrrverandi hjálparvenjarin hjá sær, Petur Simonsen, fyri at frætta, hvussu Torstein Joensen er fyri. Hann var upp á tal til landsliðið fyri nøkrum árum síðani, men tá flutti hann av landinum. Í ár hevur hann verið sera stúttur í ÍF miðverjuni. Ein annar møguleiki hevði verið at úttikið Allan Joensen úr KÍ, sum í fjør spældi so sera væl á landsliðnum. Men venjarin heldur ivaleyst, at klaksvíkingurin, sum hevur verið burtur frá fótbólti í nógvar vikur, ikki er í nóg góðari venjing til so stóra avbjóðing.

Arnbjørn Danielsen spælir hvørja ferð væl á aftasta manni hjá B36. Hjá B36 er Óli Johannesen ein sera tryggur forstoppari, og tað hevði verið nærliggjandi at roynt somu uppstilling á landsliðnum, men tað fer venjarin ikki at gera, tí hann heldur seg so at siga hvørja ferð til tað, hann hevur roynt áður (undantakið var, tá Pól Thorsteinsson varð settur á forstopparan niðri á Malta).

Henning Jarnskor og Allan Mørkøre vóru vongverjar í Tartu, og tað vera teir eisini í Kekkia. Fyri landsliðið er tað at vóna, at Oddbjørn Joensen letur Allan Mørkøre spæla í Europa Cup í annaðkvøld, tí annars fer tað at knípa við dystarvenjingini hjá spælaranum, sum ikki sleppur at taka lut í landskappingini fyrrenn 1. september.

Julian Johnsson, Magni Jarnskor, Sámal Joensen, John Petersen, Jens Erik Rasmussen og Jan Allan Müller fáa eisini boð til Kekkia ferðina. Og so er stóri spurningurin, hvussu tað verður við Una Arge og Toda Jónsson.

Álopið er stóra ivamálið

Báðir álopsmenninir stríðast við lúsku skaða, og hjá báðum er tað ógvuliga ivasamt, hvussu tað fer at taka seg upp í hesi vikuni:

– Eg spældi ikki við fullari ferð ímóti VB. Tað vil siga, at eg helt meg mitt fyri og fór ikki út í síðurnar at stríðast um bóltarnar. Eg tordi stutt sagt ikki at leggja ov nógv fyri, segði Uni Arge, eftir at hann hevði spælt allar 90 minuttirnar ímóti VB. Hann skoraði eitt mál, og eitt annað, sum hann gjørdi miðskeiðis í 1. hálvleiki, var kolldømt, tí dómarin helt, at hann hevði ov høgt bein.

– Eg taki ein dag í senn. Í annaðkvøld spæla vit ímóti Nicosia, og so fáa vit at síggja, hvussu tað fer at tørna út. Gongur tað væl, so spæli eg í Klaksvík leygardagin, og gongur tað væl, so fari eg við landsliðnum niður til Kekkia, um venjarin vil hava meg við.

Todi Jónsson spældi ikki við, tá felagið hjá honum, FC Keypmannahavn, fríggjakvøldið vann 4-3 í Parkini ímóti Aab, sum spældi 14. dystin á rað uttan at vinna. Todi var burtur frá venjing einar tveir dagar í síðstu viku, men hann vandi í gjár. Lúskan er framvegis eym, og tað er ivasamt, um hann verður tøkur at spæla fyri FCK í vikuni og at spæla landsdyst í komandi viku.

Um teir tríggir, sum eru ivasamir, ikki fara við til Kekkia, so skal venjarin finna annað fólk, og so liggur næst, at hann tekur Djóni N. Joensen og Inga Rasmussen við. Teir vóru báðir við í Íslandi, men hvørgin teirra fekk boð um at koma við til Estlands.

jh



Todi Jónsson spældi ikki, tá FCK fríggjakvøldið vann 4-3 á AaB í superliguni. Hann hevur verið burtur frá venjing, men í gjár vandi hann aftur. Mynd: Jan Müller